

*Á BitTinginum fingu luttakararnir at vita, at Ílegusavnið væntandi kemur at virka um eini tvey ár. Peningur er játtaður til savnið í 2007 og 2008.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Nú kemur Ílegusavnið

**Á BitTingi um ílegugransking í farnu viku kunngjørdi Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, at tað í næstum verður lýst eftir leiðara til Ílegusavnið, sum skal setast á stovn**

ÍLEGUGRANSKING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Ætlanirnar um ílegugransking í Føroyum er ikki spildurnýggjar. Orðaskiftið, um Føroyar skuldu fara undir ílegugransking, byrjaði longu í oktober í 1998, men av tí politiskur meiriluti ikki tóktist verða fyri ílegugransking tá, steðgaði málið eitt sindur upp.

Almanna- og Heilsumálaráðið tók tó málið upp aftur og sendi eitt uppskot til løgtingslóg um ílegugransking til hoyringar á sumri í 2004, og nakað seinni var málið lagt fyri Løgtingið.

## Fyribilsúrslit tikin til eftirtektar

Ein stýrisbólkur hjá Bitland hevur í nøkur ár gjørt eina forkanning um ílegugransking í Føroyum, og tað var úrslitið av hesi kanning, ið var lagt fram á BitTingi á Hotel Føroyum fríggjadagin. Men stýrisbólkurin var eisini longu á vári í fjør í landsstýrinum og greiddi frá fyribilsúrslitunum av forkanningini, og sambært endaligu forkanningini, vóru úrslitini tikin til eftirtektar í viðgerðini í Løgtinginum, áðrenn ílegulógin var samtykt tann 17. mai í fjør.

Ílegulógin inniber millum annað, at eitt ílegusavn verður sett á stovn. Savnið skal verða ein stovnur undir Almanna- og Heilsumálaráðnum, ið skal skipa fyri, at ein vevnaðarskrá, ein diagnosuskrá og ein ættarbandsskrá verður bygd upp í Føroyum. Hesar skráir skal Ílegusavnið umsita, og savnið kemur at hava einkarætt til at fáa til vega upplýsingar, ið verða nýttar sum grundarlag undir ílegugransking í Føroyum.

Ílegusavnið skal móti gjaldi gera sáttmálar við granskarar og granskingarfyritøkur um gransking í upplýsingunum í skráunum hjá savninum.

Sambært ílegulógini fær Ílegusavnið einkarætt at gera sáttmálar um gransking í vevnaði hjá persónum, ið eru skrásettir í Føroyum, og eisini einkarætt at útvega sær, goyma og handfara vevnað og diagnosur til ílegugransking. Hesin einkarrætturin tryggjar endamálið við Ílegusavninum, sigur landsstýrismaðurin.

Fyri at fáa atgongd til upplýsingar úr Ílegusavninum krevur hetta, at umsøkjarin hevur eina granskingarætlan, ið er góðkend av Vísindasiðsemisnevndini og Dátueftirlitinum.

## Virkar í 2008

Sum áðurnevnt er ætlanin hjá Almanna- og Heilsumálaráðnum at lýsa eftir einum leiðara til Ílegusavnið í næstum, og sambært Hans Paula Strøm, landsstýrismanni, verður tað hesin, ið skal fáa savnið upp at standa.

Ættarbandsskráin, ið skal gerast verður væntandi gjørd eftir umleið hálvumøðrum ári, meðan diagnosuskráin longu bleiv sett í gongd í 1992 við talgildu landssjúklingaskránni, og sum síðani verður dagførd so hvørt av granskingarverkætlanum. Vevnaðarskráin verður bygd upp so líðandi, sum verkætlanir verða settar í verk.

Í lógini um gransking í mannaílegum stendur, at tað er landsstýrismaðurin, ið skal áseta nærri reglur, um hvørjar treytir skulu vera í sáttmálum um gransking, m.a. um menning av føroyskari gransking, um brúk av føroyskari arbeiðsmegi, veitingar og tænastur frá føroyskum fyritøkum, gjald fyri tær veitingar og upplýsingar, sum Ílegusavnið gevur atgongd til, og part av møguligum inntøkum, sum kanningarúrslit hava við sær.

Tað verða játtaðar 8,5 milliónir krónur til Ílegusavnið í 2007 og 2008, og Hans Pauli Strøm segði á BitTinginum, at savnið væntandi virkar í 2008.

# Áhugi er fyri føroyskum ílegum

**Stýrisbólkurin hjá Bitland, sum hevur gjørt forkanningina um ílegugransking í Føroyum, hevur í arbeiði sínum staðfest, at tað framvegis er ein ávísur áhugi millum heilivágsfyritøkur at granska í føroyskum ílegum**

ÍLEGUGRANSKING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í sambandi við arbeiði hjá sær hevur Bitland verið í sambandi við fleiri av teimum, sum í nítiárunum vóru við í tilgongdini mótvegis ílegugransking í Føroyum, sum tó varð steðgað av politiskum ávum. Afturmeldingarnar frá hesum eru ymiskar, men nakað av áhuga er framvegis.

## Ræður um at gera skjótt av

Ein av teimum fyritøkunum, sum á sinni sýndu føroysku mannaílegunum áhuga, var íslendska heilivágsfyritøkan, DeCODE, sum arbeiðir við ílegugransking í Reykjavík.

Í samskifti við Bitland hevur DeCODE givið til kennar, at fyritøkan framvegis hevur stóran áhuga í føroyskum mannaílegum, men at DeCODE bíðar við at gera meira, fyrr enn lógarkarmarnir hesum viðvíkjandi í Føroyum eru fastlagdir. Men tá ið hetta er gjørt, hevur íslendska fyritøkan avgjørt áhuga í kanna umstøðurnar í Føroyum nærri.

Serkøn innan ílegugransking greiddu á BitTinginum frá, at tað ræður um at gera skjótt av í Føroyum, tí menningin á økinum er øgilig, og um vit bíða ov leingi, kann áhugin fyri føroysku ílegunum hvørva.